# UR Í RUNAVÍK





## BILAR IKKI

*Tveir mans frá bilsøluni Auto Service í Havn - vinstrumegin Heðin Weihe og Poul Jákup Poulsen - hava júst riggað til at taka ímóti fyrstu áhugaðu viðskiftafólkunum, ið fegin vilja keypa sær ein nýggja bil. Huginum at keypa sær ein nýggjan bil bilar neyvan. Spurningurin er bert, hvat pengamappan sigur. Men teir báðir sølumenninir eru í øllum førum til reiðar.*

## FRAMTÍÐ

*»Lær hin unga vegin«. Ein genta er komin á vøllin við Løkin í Runavík, meðan eitt av eldru systkjum hennara er til venjing. Kanska verður hon ein stjørna eina ferð í framtíðini. Skal tað gerast veruleiki, er í øllum førum neyðugt við venjing, venjing og uppaftur meiri venjing, eins og teir stóru.*







## TRUKKARI

*Jógvan á Toftini er fastur trukkførari her á havnalagnum í Runavík. Beint upp undir middag henda dagin var dagsins fyrrapartsverk lokið, og tíð varð at stilla upp til myndatøku. At Jógvan er av Toftum, sigur eftirnavn hansara alt um.*



## GUTÚRUR

*ki hissini túrur, sum hesi barnagarðsbørnini av Toftum vóru farin á. Tey gið allan veg upp um hæddina, og vóru nú nærum komin á fyrsta mál teirra Klokkan var farin at nærkast middegi, og nú skuldu tey fáa sær ein bita. eingin matpakki á skránni, men ein góð máltíð í Sjócafé'ini ístaðin.*



## GRAS

*Hóast tað enn eru nakrir dagar til Eystanstevnu er neyðugt at hvør einasti grøni blettur í kommununi er snøggur til vikuskiftið. Nógv er gjørt fyri at fríðka um í Runavíkar kommunu, og tað verður ikki minni gjørt burtur úr um vikuskiftið.*